

www.vision.fo

# Vision Software spennir seg út

**Vit sóknast eftir trimum nýggjum starvsfólkum í Tórshavn at byrja skjótast til ber**

## Fyrisitingarstjóri

Til høvuðsdeild okkara í Tórshavn skal setast ein fyrisitingarstjóri, ið skal virka í einari trýdeildari leiðslueind, sum er samansett av:

*Fyrisitingarstjóra*
*Sølustjóra*
*Tekniskum stjóra*

Uppgáva fyrisitingarstjórans er fyrst og fremst:
- At byggja upp og menna allar fyrisitingarligar partar av Vision Software.
- At hava ábyrgd av, og skipa fyri, allari fíggjar- og tilfeingisstýring felagsins.
- Saman við leiðslueindini at skapa karmar um eitt sunt handilsligt felag í stórum vøkstri.
- At skapa karmar um ein mennandi starvsfólka- og leiðslupolitikk.

Vit seta sum krav, at rætti viðkomandi hevur holla handilsliga útbúgving og/ ella drúgvar royndir innan sama starvsøki.
Góð løn verður latin eftir góðum avriki.

## Bókhaldari/skrivari

Til høvuðsdeild okkara í Tórshavn verður søkt eftir bókhaldara/skrivara at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðið er skipað við ábyrgd fyri fyrisitingarstjóranum og eru høvuðsuppgávurnar hesar:
- At røkja alt dagligt bókingararbeiði
- At skipa fyri debitor- & kreditorrøkt felagsins
- At gera ætlanir saman við leiðslueindini og skipa fyri allari uppfylging av hesi, undir hesum rapportering yvir fyri stjórn og nevnd felagsins. Harafturat skal viðkomandi virka sum skrivari hjá leiðslueindini og hava ábyrgd av øllum skrivligum samskifti við viðskiftafólk felagsins. Vit seta sum krav, at viðkomandi hevur holla handilsliga útbúgving og/ella hollar royndir innan bókhalds- og roknskapararbeiði.

Góð løn verður latin.

## Sølu- og samskipingarfólk til Wise-Fish deild okkara

Til deild okkara í Tórshavn skal setast eitt sølu- og samskipingarfólk, við ábyrgd yvir fyri sølustjóranum, at taka sær av sølu, menning og levering av Wise-forritsúrdráttum til fiskivinnuna. Wise er felagsheitið á eini røð av skipanum, mentar í Navision Financials umhvørvi, til fiskivinnuna. Talan er um framleiðslustýringsskipanir, søluskipanir, góðskustýringsskipanir v.m., mentar av TM-Software í Íslandi, ið eigur 50% av Vision Software. Starvið er sera spennandi og hevur við sær møguleikar fyri hollari persónligari menning og starvsmøguleikar í útlandinum, herundir Norðanlondum, Stóra Bretlandi og Norður Ameriku.

## Um VisionSoftware P/f

Vision Software er eitt forritsfelag í menning. Felagið umboðar, selir og mennir Navision og Navision Financials úrdráttir, og er fyrsta Navision Solution Center í Føroyum. Í løtuni eru 10 starvsfólk knýtt at Vision Software, ið hevur deildir í Tórshavn og Klaksvík. Eigarar av Vison Software P/f eru persónligir stigtakarar, Farodane P/f í Tórshavn og TM-Software í Íslandi. Felagið fæst eisini við frálæru innan Navison og Navision Financials í samvinnu við skeiðdepilin KVASIR í Tórshavn.

Skrivligar umsóknir við møguligum viðmælum verða at senda til okkara innan 1/5 2000.

**Vision Software P/f**
Stengavegur 3
FO-700 Klaksvík
*Att.: Jógvan Eliasen, stjóri*

Ynskja tygum at frætta meiri um størvini, eru tygum vælkomin at ringja til omanfyristandandi.

FD-04-000-5

NAVISION® solution center

VISIONSOFTWARE

Brekkutún 4
110 Tórshavn
Tlf. 32 14 40

Stengavegur 3
700 Klaksvík
Tlf. 45 79 40



variant

Galvaniseraðir viðfestisvognar



Sosialurin - 311820

Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008



BILLUTIR

ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR

F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666



Roynið tað nú!

Klænkið

Kennið vælveru.
Fáið meira orku og sleppið undan dagligu strongdini. Við einum 100% náttúruevni.
Heilt ótrúlig úrslit, tí tað riggar altíð.
Hoyrið meira.

HL. MARKETING
Tlf. 314484
E-mail:innor@post.olivant.fo



SOLARIUM til leigu
ymsar støddir.
JC. Solarium
Tel. 315017 - 215017






# Signar hevði valið millum at verða skotin ella hongdur



JAN MÜLLER

Tingið fer týsdagin undir 1. viðgerð av landskassaroknskapunum og harvið málinum, ið var orsøkin til, at Signar á Brúnni, landsstýrismaður herfyri bað um at verða loystur úr starvi. Samtíðis heitti hann á løgmann um at fáa eina kanning av øllum málinum, soleiðis at hann kundi verið reinsaður fyri ákærunum. Hann metti seg ósekan.

Vit hava spurt løgmann, hvat hann fer at fyritaka sær. Anfinn Kallsberg sigur, at tá Signar á Brúnni biður seg um at taka stig til slíka kanning, so skal hann brúka tey amboð, ið eru í stýrisskipanini við eftirliti og kanning av einum landsstýrismanni sum so.

Her er so antin talan um politiska ella eina juridiska handfaring. Er tað illgruni um, at ein landsstýrismaður ikki hevur hildið seg til tað, sum er ásett í lóg o.ø. so skal Landsstýrismálanevndin taka málið upp. Tað hevur hon gjørt í hesum førinum, og so skal hon syrgja fyri, at málið fær eina óvilduga viðgerð sigur løgmaður sum samtíðis vísir á, at í hesum førinum skuldu teir so heitt á løgtingsformannin um at sett eina kanningarnevnd. Tað er tí ikki landsstýrið, sum skal kanna ein landsstýrismann, men harafturímóti løgtingið við teimum organum, sum liggja í stýrisskipanini.

*-Merkir tað, at tú fer einki at fyritaka tær, nú tú hevur móttikið eina áheitan frá Signar á Brúnni um eina kanning?*

-Tað veit eg ikki - um eg ikki taki okkurt stig. Men eg skal ansa eftir ikki at taka nøkur stig, sum uppá nakran hátt kunnu undirkenna tað eftirlitsapparatið, sum er ásett í stýrisskipanini.

*-Hevur tú nakrantíð givið Signar á Brúnni ta fatan, at ein kanning fór at verða gjørd?*

-Tað vil eg ikki beinleiðis siga. Vit hava ikki tosað um júst, hvussu vit skuldu gera hetta. Vil Landsstýrismálanevndin ikki gera eina slíka kanning, so er møguligt , at løgtingið biður um eina kanning.

Løgmaður vísir í hesum sambandi á, at møguleiki er hjá sær at heita á løgtingið um at fáa gjørt ta kanningina. Men hann sigur seg ikki í dag kunna siga, um hann fer at gera tað.

Hinvegin kann man eisini fara víðari við málinum vísir hann á. Tað er rættiliga stórur munur á, um málið er politiskt ella juridiskt. Har hevur løgmaður so eisini ein annan møguleika í sambandi við ábyrgd landsstýrismanna, men tá er tað ein rein juridisk kanning, sum skal gerast gjøgnum politiið. Tá skal man hava grundaðan illgruna um, at nakað beinleiðis ólógligt er farið fram. -Her er tað so ikki spurningurin, um nakað ólógligt við persónligum motivum ella onkrum øðrum, liggur aftanfyri. Tað er meira ein spurningur um skipanir.

### Kanning av skipanini

Løgmaður heldur, at tað kundi verið sera áhugavert at fingið gjørt eina kanning av skipanini, bæði stýrisskipanini sjálvari og øðrum skipanum, sum eru gjørdar við útgangsstøði í stýrisskipanini, eitt nú roknskaparlóg, grannskoðaralóg, játtanarskipan í sambandi við fíggjarlóg osfr. - og tá fingið greiðu á, um alt tað hongur saman, um nakar kinkur er í tí! Tað er so eitt mál fyri seg sjálvan og ikki eitt mál um at kanna avgerðina hjá Signar á Brúnni ella ikki leggur hann aftrat.

-Tað er í hvussu er nakað, sum eg haldi man so avgjørt eigur at taka upp. Hvussu man ger tað havi eg ikki nakra patentloysn uppá enn. Aðrir landsstýrismenn kunnu jú koma út í júst somu trupulleikar sum teir, ið nú hava verið frammi.

Hvat viðvíkur málinum hjá Signar á Brúnni so heldur løgmaður, at har eru mong viðurskifti, sum ikki sampakka og ikki ganga upp í eina størri eind. -Tá er tað systemið, sum galið er við. Og tað eiga vit so avgjørt at hyggja uppá og rætta, tí tað er eingin orsøk til at hava eina skipan, sum ikki hongur saman.

### Skipanin ikki nóg góð

*-Meinar tú harvið, at Signar á Brúnni hevur verið offur fyri einum systemi, sum ikki er nóg gott?*

-Tað er eingin ivi um, at systemið hevur ikki verið nóg gott, tí tað eru ongar greiðar reglur um, hvussu hann skuldi havt borið seg at fyri at umgingist tann iva, sum er íkomin. Og tað er ein trupulleiki í sær sjálvum. Men um so alt er rætt farið fram alla vegin ígjøgnum, alla tíðina og av øllum instansum, tað er so nakað heilt annað.

*-Er tað náttúrligt, at tað er Tjóðveldisflokkurin, sum tekur upp spurningin um kanningina í løgtinginum, ella kennir tú hetta eisini at vera tína mor-alsku ábyrgd mótvegis einum av tínum egnu landsstýrismonnum?*

-Nú er tað soleiðis, at hevði málið verið komið til viðgerð í tinginum fyrst, so hevði ein løgtingsviðgerð sjálvandi havt kunnað fingið svar uppá nakrar av hesum spurningum. Hyggja vit isolerað eftir stýrisskipanini og hennara áseting, so kann man nokk siga, at her er ikki handlað í tráð við stýrisskipanina. Men hinvegin kanst tú so spyrja: hvussu skuldi tað so verið handlað, so tað hevði verið í tráð við stýrisskipanina? Tað er í tí løtu, at Sjónvarp Føroya hevur nakrar útgjaldingar í 1998, at tað ikki er í tráð við stýrisskipanina, og tað er ikki ein handling, sum Signar á Brúnni er uppií. Men tað, sum útloysir hetta, er, at likviditeturin hjá Sjónvarpinum í 99 verður so vánaligur, at Sjónvarpið nú bráddliga ikki megnar at halda tær skyldur, sum tað hevur átikið sær. Og tað er har trupulleikin kemur inn.

Løgmaður sigur víðari, at verður hugt eftir játtanarskipanini, sigur hon, at ein landsstýrismaður hevur skyldu til at útgjalda, um so er, at tað kann ávísast, at nakrar bindingar, sum landskassin hevur tvs. lønarútreiðslur ella annað, skulu verða goldnar, um so er, at útlitið fyri, at man ikki ger tað, gevur landskassanum uppaftur størri útreiðslur. Tvs. at tað man sigur í játtanarskipanini er eitt, og tað, sum man sigur í stýriskipanini er nakað heilt annað. Og tí fær tú ta konfrontatiónin við, at landsstýrismaðurin - um hann handlar ella letur vera við at handla - antin brýtur eina stýrisskipan ella eina játtanarskipan.

*-Landsstýrismaðurin hevur verið ein av tínum samstarvsfeløgum, og er tað so, at tú vil ganga so langt sum til ber fyri at stuðla einum starvsfelaga í Tinganesi, um tú ikki heldur, at hann hevur gjørt nakað skeivt?*

-Púra givið. Tað vil eg altíð gera, og eg meini eisini, at tað er bæði rætt og rímuligt, at man syrgir fyri, at hevur ein persónur verið fyri órætti ella bara tann allar minsti ivi er um hann hevur verið fyri órætti, so hevur man skyldu til at gera alt, sum stendst fyri at fáa avklárað slík viðurskifti. Spurningurin er so bara, hvussu eg fái gjørt tað ella um eg fái gjørt tað. Og tað er hetta, sum eg ikki eri liðugur at kanna.

Løgmaður sigur víðari, at hetta sjálvandi eisini er ein spurningur, sum hann má tosa við løgtingið um og leggur aftrat, at tað kann væl vera, at hann ikki tekur nakra støðu fyrr enn hann hevur hoyrt orðaskiftið í tinginum.

### Til botns við máli

*-Verður tað nakar trupulleiki at fáa 13 tingmenn at biðja um eina kanning?*

-Tað havi eg ikki kannað, men tá hevur tú so møguleika at fáa sett ein kanningarstjóra, sum kann fara til botns við málinum, og eg haldi tað hevur stóran týdning, og eg haldi veruliga eisini, at Landsstýrismálanevndina átti at verið hugað fyri tí, eisini fyri framtíðina. Men avgerðin er sjálvandi teirra.

*-Tá Edmund Joensen ikki vil hava eina kanning metir tú tað so at vera ein politisk avgerð?*

-Nei. Teir hava eina starvsreglugerð at ganga eftir, og har stendur púra greitt, at hetta er eitt mál, sum skal sendast til løgtingsgrannskoðararnar. Tað er gjørt, og teir eru komnir við sínum niðurstøðum. Men hetta vísir bara, hvussu avmarkaðir møguleikarnir eru.

Løgmaður viðgongur, at tað eisini á øðrum økjum í frágreiðingini frá landsgrannskoðaranum eru atfinningar, men hyggur man at tí í mun til, hvat er gingið fyri seg fyrr tíðini, so má man siga, at tað batnar í hvørjum.

-Tá vit nú hava fimm ár, so er greitt, at kritikkur er meira ella minni fyri øll árini, men eg trúgvi vit sum frálíður fara at fáa skil á viðurskiftunum.

*-Um tú sjálvur sat í stólinum hjá Signari á Brúnni, hevði tú borið teg øðrvísi at, enn hann gjørdi í aktuella málinum?*

-Eg veit ikki. Tað er altíð so lætt at vera bakklókur.

*-Hondina á hjartað?*

-Eg tori ikki at siga, hvat eg hevði gjørt. Men eg trúgvi, at Signar á Brúnni hevur sitið í tí støðu, at hann skuldi velja millum ein svartan skerm - og vita, at tað hevði ført til meirútreiðslur hjá landskassanum - ella tað at handla, soleiðis sum hann hevur gjørt og sum hann eisini hevur fingið ráðgeving um er rætt, men sum hann nokk serliga aftaná, at fíggjarnevndin segði nei, hevur havt nakrar trupulleikar av. Tað ivist eg ikki í.

*-Metir tú ráðgevararnir hava gjørt eitt nóg gott arbeiði?*

-Tað veldst sjálvandi um út frá hvørjum sjónarmiði tú sær hetta, og hvar í gongdini tú er. Tað er sjálvandi ongantíð rætt at koma í eina støðu, har ein stovnur hevur eitt stórt yvirtrekk, og so kann man kanska seta spurning við tíðsfaktorin - frá tí, at man fær tað at vita, til tað verður gjørt nakað munagott við málið.

Men eg trúgvi, at tá man er komin til støðuna, tá hetta hendir, tá hevur man næstan valið millum at vera skotin ella hongdur - ella valið millum pest og kolera.


GSM frá Føroya Tele



...so ert tú altíð har, tú skalt vera!

Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...

**Vanligt hald**
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.

**Vinnuhald**
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.

**Frítíðarhald**
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.

**Vinnuhaldið**
Til teirra, sum serliga brúka telefonina um dagin, og sum altíð vilja hava samband við viðskiftafólk og starvsfelagar. Eisini er hópurin av eykatænastum knýttur til haldið, t.d. SMS-tekstboð, vís nummar og dataflutningur.

| Kostnaður fyri vinnuhald | |
|---|---|
| Stovning | 700,00 kr. |
| Mánaðargjald | 200,00 kr. |
| Minuttgjald - dag | 1,60 kr. |
| Minuttgjald - kvøld | 1,60 kr. |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. |

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo